# FRÁ HENNI



## Fyrsta mál av sínum slag

**Lene Moyell Johansen, fulltrúi hjá Ríkisumboðnum vónar ikki, at hon nakrantíð aftur fær eitt slíkt mál upp í hendurnar**

Lene Moyell Johansen, sum hevur viðgjørt hetta málið hjá Ríkisumboðnum, vil ikki gera nakrar viðmerkingar til ítøkiliga málið. Hon hevur tagnarskyldu.

Hon vil tó siga so mikið, at hon er sannførd um, at avgerðin var røtt út frá galdandi lóggávu.

Eftir tilmæli frá tí føroyska adopsjónssamráðnum, ið er samansett av einum lækna, einum løgfrøðingi og einum sosialráðgeva, tók Ríkisumboðið avgerðina um, at góðkenningin til at ættleiða skuldi fella burtur, og henda avgerð varð staðfest í donsku adopsjónsnevndini, har 10 fólk sita. Átta av hesum umboða ymiskir fakbólkar. Fýra limir umboða læknavísindi- pædiatri, intern medisin, psykiatri og barna- og ungdómspsykiatri, ein limur er sálarfrøðingur, ein limur er sosialráðgevi, tveir limir eru løgfrøðingar, meðan tveir limir eru leikfólk – formaðurin er landsrættardómari.

– Hetta var ein ógvuslig avgerð við stórum menniskjaligum avleiðingum, so tað hevur sjálvsagt ikki verið nøkur løtt avgerð at taka. Ríkisumboðið kann ikki upplýsa, hvat var orsøkin til, at eitt so ógvusligt stig varð tikið, sigur Lene Moyell Johansen.

Sambært Dan Knudsen, ríkisumboðsmanni, hevur einki slíkt mál nakrantíð áður verið í Føroyum, men ta er hent fyrr í Danmark.

**umboðnum og hjá adopsjónssamráðnum, sum kom til ta niðurstøðu, at góðkenningin til at ættleiða varð tikin aftur frá Maj-Britt og manninum.**

**– Við stuttum skotbrái fingu vit boð um at koma á fund hjá Ríkisumboðnum klokkan 2 fríggjadagin í seinastu viku, og um kvøldið vóru eg og mamma aftur á fundi við ein fulltrúa hjá Ríkisumboðnum.**

**– Hon spurdi meg um alt millum himmal og jørð, og tá ið eg ikki mintist okkurt, segði hon seg hava allar tær upplýsingarnar, sigur Maj-Britt.**

**Fulltrúin segði henni, at um hon ætlaði at kæra, skuldi hetta gerast í seinasta lagi klokkan 10 mánamorgunin. Tað var ikki lætt at náa, tí vikuskiftið var ímillum.**

### Innrás

**Mánadagin var familjan samlað, og knappliga sóu tey fremmandafólk í túninum. Har vóru umboð fyri barnaverndina, ein sosialráðgevi, ein fulltrúi frá Ríkisumboðnum og tveir politistar.**

**– Túnið fyltist við bilum, og tey komu til okkara uttan aðra ávaring. Eg varð biðin um at pakka nøkur klæðir niður og finna fram bamsur og annað, sum Markus var góður við, sigur Maj-Britt.**

**Hon grætur alla tíðina, meðan hon sigur frá.**

**– Og eg havi fingið at vita, at mánakvøldið fóru tey til Danmarkar við honum, tí hann skuldi á eitt barnaheim. Men hvar kundi eg ikki fáa at vita. Eg fekk eisini at vita, at eg ongantíð síggi Markus aftur.**

**Majbritt sigur, at tað var ein ræðulig løta. Hon var púra frá sær sjálvari og hini í familjuni eisini. Lagið var heldur ikki gott á gestunum í túninum.**

**– Og pápin hjá dreinginum er ikki heima. Hann er umborð á skipi út fyri Nigeria og slapp ikki at siga farvæl við sonin. Tá ið hann kemur heimaftur, er eingin sonur í húsunum.**

### Avleiðingar fyri barnið?

**Maj-Britt skilir ikki stigið, sum myndugleikarnar hava tikið móti barninum. Markus varð ryptur upp við rót í Etiopia og kom til Føroya til fólk, sum hann knýtti seg at beinanvegin. Útlitini til, at hann fór at fáa eitt gott lív, vóru góð. Nú varð hann eina ferð enn skræddur frá sínum næstu.**

**– Hvussu við barnsins tarvi? Eitt er, at vit øll eru farin í knús, men hvat kann hetta ikki fara at gera barninum?**

**Maj-Britt hevur gjørt sær greitt, at hon aldrin aftur verið mamma.**

**– Vit vónaðu í fleiri ár at fáa eitt barn, men ikki bar til. Umsíðir fingu vit heimsins fittasta barn, og so komu tey bara og tóku hann, sigur Maj-Britt, sum er í tí óvanligu støðu, at hon er í barsilsfarloyvi men hevur einki barn.**

**– Eg veit ikki, um eg tori út aftur í gerandisdagin. Fólk halda meg ivaleyst vera eina vánaliga mammu. Alt mítt lívsgrundarlag er rypt undan mær, sigur Maj-Britt.**